# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Clintonvitjan og hvat so!

Mong eru tey, ið eru løtt um hjartað, nú tað eydnaðist at fáa Bill Clinton væl og virðiliga niður og uppaftur av flogvøllinum í Vágum. Tá tað bráddliga gjørdist grátt og myrkt í Vágum mánamorgunin mundu mong fáa klump í hálsin. Skuldi tað nú fyri aðru ferð miseydnast at fáa Clinton til Føroya!

Alt gekk tíbetur sum fótur í hosu, og tað eiga øll, ið hava havt við hesa vitjan at gera, rós fyri. Tað kann geva umheiminum eina kenslu og fatan av, at sjálvt úti í tí fjarskotna og veðurbarda Atlantshavi fungera tingini. Kanska hetta kann fáa onnur kend og týðandi fólk at leita henda vegin. Fyri ikki at tosa um ráðstevnur og toppfundir á altjóða støði. Kanska vit kunnu siga, at við hesi væleydnaðu vitjan, eru lunnar lagdir undir einum Føroyum sum framtíðar verti fyri fundum og ráðstevnum á altjóða stigi. Og tá eru umstøðurnar altavgerandi. Skiftandi veður mugu vit liva við. Men at vit fáa útbygt fasilitetir í landinum, sum kunnu bjóða ráðstevnum og toppfundum henda vegin er alfa og omega. Vit kunnu tí fegnast um, at Norðurlandahúsið verður útbygt til nettupp at hýsa slíkum, og at vit hava fingið gistingarhús á altjóða støði.

Tá hetta er sagt mugu vit ikki gloyma, at Clintonvitjanin snýr seg ikki bara um at seta Føroyar á heimskortið. Hon snýr seg eins nógv um at fáa okkum at lurta eftir teimum signalum hesin klóki og royndi heimsmaðurin sendir okkum á okkara trappusteini.

Føroyar mugu gerast ein meira virkin partur av heimssamfelagnum eitt nú við at geva okkara íkast til stríðið móti fátækradømi, Aids og fyri einum grønari/umhvørvisvinarligari samfelag. Tað er m.a. við hesum boðskapi, at Clinton kemur til okkara. Um somu tíð mugu vit eisini lata okkum meira upp fyri tí, sum humanistiski og globali Clinton stendur fyri, nevniliga einum meira sosialum og tolerantum hugburði, har vit góðtaka tey, sum eru øðrvísi og ikki sum fleirtalið. Vit mugu eisini ásanna, at vit kunnu ikki isolera okkum. Vit noyðast at gerast partur av heimsssamfelagnum og taka við teimum ábyrgdum hetta inniber. Og tað gera vit ikki í dag. Vit taka ikki globala ábyrgd. Ikki fyrr enn nú hava vit tikið eitt fyrsta stigið við Kyoto.

Vónandi hava stigtakararnir til hesa vitjan eisini gjørt sær greitt, at talan er ikki bara um at fáa okkum á heimskortið men so sanniliga eisini at fáa globaliseringini inn um okkara egnu dyr. Ikki bara tí vinnulígu men eisini ta humanistisku og menniskjansligu globaliseringina, sum byggir á forstáilsi, virðing og samstarv og á viljan at geva og hjálpa. Her hava vit enn nógv at læra. At vit eru errin av okkara landi og fegin síggja umheimin vísa okkum ans og áhuga og fáa kendar persónar sum Clinton at kenna seg væl her, er eisini ein náttúrligur partur av øllum hesum.

**Sosialurin**

## Harmast tíðindaflutning í Dimmalætting

Leiðsla Landssjúkrahúsins harmast um, at Dimmalætting velur ikki at geva føroyska sjúkrahúsverkinum møguleika at svara upp á tær álvarsligu atfinningar, ið førdar hava verið fram í blaðnum seinastu dagarnar.

Dimmalætting hevur seinastu dagarnar prentað fyrstu greinarnar í einari greinarøð, sum sambært blaðnum skal kasta ljós á »føroyska sjúkrahúsverkið, tá ið hetta hevur víst seg frá sínu ringastu síðu«. Hetta er eitt sera álvarsligt evni, og vit, ið varða av tí parti av føroyska sjúkrahúsverkinum, sum hoyrir undir Landssjúkrahúsið, halda tað vera gagnligt, at ljós verður varpað á møguligar trupulleikar og óhepnar mannagongdir í føroyska sjúkrahúsverkinum. Opið kjak um hetta evni er ein avgerandi fyritreyt fyri, at føroyska sjúkrahúsverkið kann mennast, øllum føroyingum at frama. Tí harmast vit samstundis stórliga um, at Dimmalætting ikki velur at kasta ljós á evnið á ein opnan og sakligan hátt.

Heldur enn at lýsa málini frá fleiri síðum og skapa eina heildarmynd, velur Dimmalætting bert at brúka ein ljóskastara, og ikki geva føroyska sjúkrahúsverkinum møguleika at svara upp á tær álvarsligu atfinningar, sum verða førdar fram.

Við hesum arbeiðshátti skaðar Dimmalætting meira enn hon ger gagn, tí slík einsporað viðgerð ber altíð í sær, at fólk kenna seg forfylgd og tískil fara upp á bakbeinini heldur enn inn í eitt mennandi kjak um møguligar trupulleikar og óhepnar mannagongdir, ið ljós annars mátti verið varpað á.

Í evsta føri fremur blaðið við hesum arbeiðshátti eisini brot á sítt egna redaktionella grundstøði, sum millum annað sigur: »Sum týdningarmikil partur í samfelagnum eiga fjølmiðlarnir leiklutin sum amboðið, ið kunnar, fremur kjak og viðger samfelagið við kritiskum eygum. Fjølmiðlarnir hava tí eina serliga ábyrgd fyri, at øll viðkomandi sjónarmið sleppa framat.« (kelda: http://pf.dimma.fo)

Vit í leiðsluni á Landssjúkrahúsinum ivast stórliga í, um Dimmalætting, við tí sum higartil er prentað av greinarøðini um føroyska sjúkrahúsverkið, hevur megnað at røkt sína ábrygd sum ein av landsins størstu tíðindamiðlum, tá hon ikki loyvir føroyska sjúkrahúsverkinum at koma til orðanna at svara álvarsligum atfinningum. Vit hava verið í beinleiðis sambandi við leiðsluna á Dimmalætting í eini roynd at gera vart við óhepnu støðuna, men áheitanin varð ikki gingin okkum á møti. At lata Landssjúkrahúsið koma til orðana í greinunum passaði ikki inn í strategi Dimmalættingar, var grundgevingin.

Tað undrar okkum almikið, tá Dimmalætting í oddagrein, áðrenn umtalaða greinarøðin yvirhøvur er byrjað, leggur starvsfólk á Landsinssjúkrahúsum undir skýmaskotavirksemi og staðfestir at: »Tað óhugnaliga í hesum er, at tá til stykkis kemur, hevur eingin ábyrgdina, øll sleppa sær undan, og truppult er at hanga álvarsligu tilburðirnar á ávísan knabba. Innan sjúkrahúsheimin halda øll hondina yvir hvørjum øðrum.«, so er ikki sørt at vit sum ábyrgdarhavandi á Landssjúkrahúsinum ivast eitt sindur í, um Dimmalætting yvirhøvur vil fremja eitt opið og konstruktivt kjak um føroyska sjúkrahúsverkið, ella um "strategiin" er ein onnur.

Vit hava ikki eitt lýtaleyst sjúkrahúsverk og lýtaleyst er Landssjúkrahúsið heldur ikki. Men vit halda, at tað má vera í áhugamálinum hjá almenninginum, at Landssjúkrahúsið eisini fær síni sjónarmið fram, so lesarin ikki situr eftir við varðhuganum av, at føroyska sjúkrahúsverkið ikki virkar. Tí tað ger tað - hvønn dag, alt døgnið, alt árið.

Sjúkrahúsverkið hevur gott av kritikki og vit vilja eggja fólki at kæra, um tey meta seg hava fingið eina vánaliga tænastu. Tað er á henda hátt, at tað ber til hjá sjúkrahúsverkinum, at fáa gjørt nakað við tað. Landssjúkrahúsið upplýsir um kærumøguleikar í kunningarfaldarum og heimasíðu, og í nógvum førum fáa fólk eisini munnliga at vita um kærumøguleikarnar.

Í teimum ítøkuligu dømunum, sum hava verið frammi í Dimmalætting í seinastuni, er talan um sera óhepnar hendingar, har nógv í sjúklingagongdini er gingið illa. Dømini, sum hava verið frammi, eru syrgilig og tað eru eisini onnur dømir, sum kundu verið tikin fram í eini gjøgnumgongd av óhepnum tilburðum. Tilburðir, ið ikki skulu forsvarast, men sum geva høvi til sjálvrannsóknan. Hetta er tíbetur ikki tað, sum sjúklingurin vanliga er úti fyri. Tað má ikki valda ivi um, at vit, sum varða av Landssjúkrahúsinum, taka einhvønn tilburð í stórum álvara og gera tað, sum til ber, fyri at lært verður av hesum hendingum so hesar ikki skulu koma fyri aftur.

*28. september 2007*
*Sjúkrahúsleiðslan á Landssjúkrahúsinum*

***Allan Skaalum, sjúkrahússtjóri***
***Tummas í Garði, læknastjóri***
***Marin Vang, sjúkrarøktarstjóri***

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.